# Frálandsreiðaríið Vroon leggur 12 skip

**Jan Müller**

10.10.2015 - 14:14

Oljan.fo

Eitt av teimum stóru frálandsreiðaríunum, hálendska ”**Vroon Shipping Services”** tekur nú avleiðingarnar av lækkandi oljuprísunum og leggur 12 av tess frálandsskipum. Eitt umboð fyri felagið sigur, at fram til nýggjár verða fimm veitingarskip hjá oljupallum og átta hjálpar- og bjargingarskip løgd í rúma tíð. Víðari verður sagt, at eisini umborð á verandi skipum fer manningartalið at minka. Felagið miðjar eftir at fremja rationaliseringar og sparingar i frálandsflotanum.

Skipini hjá Vroon arbeiða m.a. vestan fyri Hetland, og fleiri teirra hava verið í Føroyum fyri at skifta manning, bunkra og proviantera. Eitt skifti ljóðaði, at føroyskt felag var um at gera eina avtalu við Vroon um at fáa fleiri av teirra skipum at brúka Føroyar sum tænastudepil. Vroon, sum brúkar havnina í Lervick, hevur leingi verið ónøgt við viðferðina tað hevur fingið frá myndugleikunum har. Hetta m.a. tí at fiskiskip og ferðamannaskip hava fingið størri raðfesting.

Um sparingarnar fara at gera, at færri Vroon skip verða at síggja her um leiðir í framtíðini er enn óvist.